# Lærarar hittust í góðveðrinum









*Sáttmálasettir lærarar skipaðu sunnudagin fyri tiltaki á Vaglinum í Havn, har m.a. røður og tónleikur setti dám á góðveðursdagin*

DAGFINN OLSEN

Tað kundi verið líkt til, at stóð tað til veðurguðarnar, so hevði semja langt síðani verið funnin millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Tá sáttmálasettir lærarar í arbeiðssteðgi sunnudagin klokkan 16 skipaðu fyri tiltaki við sangi og røðum á Vaglinum í Havn, skein sólin. Talan var um ein av bestu várdøgum, ið vit hava sæð í ár, so hóast døpru orsøkirnar til tiltakið, so mundi mangur hugna sær hesa løtuna á Vaglinum.

Á røðarapallinum stóðu Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, Annlis Sverradóttir, umboð fyri lærarar og samskiparar, Eyðdis Baldvinsson, umboð fyri skúlaleiðslur og eisini helt ein næmingur røðu.

Pauli Hansen, Heri Kragesteen og onnur sungu m.a. „Eg liti ljósið“ og eisini var felagssangur.

Eisini varð skipað fyri innsavnan av undirskriftum til áheitan á myndugleikar um at bera so í bandi, at endi brátt fæst á ósemjuni.

Løtan á Vaglinum bar brá av hugna. Nógv fólk hevði leitað sær at lurta eftir røðum og sangi og lagið var gott í góðveðrinum sunnudagin.

***Myndir: Jens Kristian Vang***













## Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Hans Fróði hevur aftur brotið óstbeinið

***Noreg:*** *Enn er ikki greitt, nær miðverjin í Sogndal verður førur fyri at spæla fótbólt aftur*

Stríðið hjá Hans Fróða Hansen at koma longri fram í altjóða fótbólti hevur fingið enn eitt skot fyri bógvin. Í løtuni gongur hann við brotnum óstbeinið, og í gjár var heilt ógreitt, nær hann aftur verður førur fyri at spæla fótbólt. Tað kann hugsast, at Hans Fróði fer at koma til Føroya fyri at fáa viðgerð, men hetta var ikki greitt, tá vit tosaðu við landsliðsmannin í gjár.

Brotið á óstbeinið, sum var tað triðja á sama staði, kom hósdagin 30. mars:

– Eg vann eina takling, men ólukkutíð datt mótstøðumaðurin niður á meg, og óstbeinið brotnaði aftur. Hetta er ræðuligt. Eg brenni eftir at spæla fótbólt, men hetta darvar mær øgiligt, sigur Hans Fróði Hansen, sum hevur glett seg at fara við liðfeløgunum á landsliðnum til Liktinstein í aðru viku. Nú er ógvuliga ivasamt, hvussu tað verður við tí ferðina hjá Hans Fróða.

**Sama brot**

Heilt stutt frammanundan at landsliðið síðst í januar fór á venjingarlegu í La Manga breyt Hans Fróði óstbeinið. Hetta hevði við sær, at hann var noyddur at geva avboð til venjingarleguni.

Ta ferðina rann og súkklaði hann í sjey vikur, áðrenn hann aftur luttók í venjingini. Tað gekk skjótt rætta vegin, og á venjingarleguni í La Manga 15. til 25. mars var hann við í fleiri dystum. Undir venjing hósdagin 30. mars var aftur galið:

Nú hevur Hans Fróði Hansen brotið sama óstbeinið tríggjar ferðir. Fyrsta ferðin var í 1996, tá hann spældi við B68:

– Ta ferðina settu teir eina metalplátu í óstbeinið. Tá eg var heima á jólum, varð hon tikin burtur. Tá varð sagt, at hon var óneyðug. Nú veit eg ikki, hvussu tað verður. Kanska verður neyðugt at seta hana í aftur ella kanska mugu teir taka bein onkra aðra staðni frá og seta tað í óstbeinið, sigur Hans Fróði Hansen, sum ógvuliga fegin ynskir, at tað skal ganga skjótt.



*Hans Fróði Hansen hevur enn einaferð brotið óstbeinið*

# Venjarin hjá Óla fingið sekkin

*Danmark: Spælararnir frættu í fjølmiðlunum, at leiðslan hevði givið væl dámda venjaranum sekkin*

Tað gongur skjótt hvønn vegin, og í nógvum førum frættist tað skjótt, sum gongur fyri seg. Hetta máttu fótbóltsspælararnir í AGF ásanna seinnapartin leygardagin. Tá lósu summir teirra á tekst tv, at leiðslan í felagnum hevði loyst venjaran Peter Rudbæk, úr starvinum.

Óli Johannesen var ikki til venjingar fyrrapartin leygardagin. Vanliga venja allir í 1. deildar hópinum saman, men í vikuskiftinum luttaka bara teir í venjingini, sum eru í hópinum til næsta dyst. Óli Johannesen telist í løtuni ikki millum teir, sum spæla við 1. liði. Leygardagin spældi hann við 2. liði, sum heldur til í danmarksseriuni.

Venjingin hjá teimum á besta liðnum var klokkan tíggju leygarmorgunin. Tá venjingin var liðug, og spælararnir fóru til hús, varð Peter Rudbæk kallaður til fundar við leiðsluna, sum boðaði honum frá, at nú var hann loystur frá allari ábyrgd í felagnum.

Sunnumorgunin kundu spælararnir lesa í bløðunum, at felagið hjá teimum arbeiddi við einari ætlan, sum gekk út uppá, at fyrrverandi 1. liðs spælararnir, Kent Nielsen og Lars Lundquist – teir eru báðir gamlir landsliðsspælarar og Lars hevur áður verið venjari í AGF – skulu taka sær av venjingini fram til summarsteðgin. Sunnukvøldið vórðu tíðindini alment váttað í AGF.

Í gjárkvøldið skuldu teir báðir hava ábyrgdina av AGF í lagnudystinum á heimavølli móti botnliðnum úr Vejle.

Peter Rudbæk skuldi bara vera venjari hjá Óla Johannesen og teimum fram til summarsteðgin. Tá skal Ove Christensen, sum áður hevur vant Viborg og sum nú er venjari hjá danska U–18 landsliðnum, taka ábyrgdina á seg, og tað fer hann at gera uttan mun til um AGF tá verður í superliguni ella í 1. deild.

Tað er langt síðani, at tað var avrátt, at Peter Rudbæk 1. januar komandi ár skal taka við starvinum sum venjari í AaB, og sambært leiðsluna í AGF bilar manninum einki, sum teir hava givið sekkin:

– Venjarin er góður, men tá støðan er hættislig í botninum, so mettu vit tað vera neyðugt at gera okkurt.

At venjarin, sum føroyskir fótbóltsvenjarar vitjaðu í heyst, er góður tóku spælararnir hjá AGF undir við í vikuskiftinum. Í donskum fjølmiðlum søgdu teir seg ikki skilja, hví leiðslan hevði givið Peter Rudbæk sekkin.

JH

**Myndir av flogbólts- og borðtennisvinnarum í blaðnum í morgin**



*Allan Simonsen, landsliðsvenjari, var um vikuskiftið á Toftum, har hann hugdi eftir nøkrum av leikarum sínum*

# Alt upp á pláss aftur

*Løgmanssteypið: Tríggir teir síðstu útsettu dystirnir verða avgreiddir mikukvøldið og hóskvøldið*

í góðum várveðri vórðu seks dystir í bólkaumfarinum í steypakappingini spældir sunnudagin.

HB vann størsta sigurin – 5–0 á Sevmýri. Størsti dramatikkurin og flestu málini vóru í Sumba. Klaksvíkingar mistu málverjan í 1. minutti, og í 43. minutti reyk ein sumbingur út. KÍ fekk fimm, og Sumba fekk tvey mál.

Eisini í Vági var reyða kortið á lofti. VB var undirmannað í meiri enn ein hálvan tíma, men kortini megnaðu teir at javna fimm minuttir fyri leiklok. Gleðin var kortini stokkut, tí NSÍ skoraði tvey mál síðstu løtuna.

Tríggir dystir frá næstsíðsta vikuskifti, tá landið var kavaklætt, eru ikki spældir, men teir verða avgreiddir í hesi vikuni. Talan er um dystirnar Sumba–VB, NSÍ–KÍ og GÍ–HB.

Sambært yvirlitið frá FSF verða allir dystirnir spældir í annað kvøld. Men vit skilja á NSÍ, at ætlanin er at dysturin í Runavík millum NSÍ og KÍ skal ikki spælast fyrrenn hóskvøldið. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað verður fótbóltur í Eysturoy bæði mikukvøldið og hóskvøldið.

Allan Simonsen, landsliðsvenjari, var í Føroyum um vikuskiftið. Ørindini vóru at síggja dystin á Svangaskarði millum B68 og B36. Har vóru seks spælarar, sum vóru við landsliðnum á venjingarleguni í La Manga. Landsliðið skal í aðru viku niður til Liktinstein at spæla venjingardyst.